# Løgreglan nógv um at vera í vikuskiftinum




## Støkkknívur og bardagi á sundalagsstevnu

– Nógv full fólk hava gjørt um seg á sundalagsstevnu, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn. Leygarmorgunin var eitt nú bardagi á skránni uttan fyri nýggju ítróttahøllina í Kollafirði. Løgreglan kom á staðið og koyrdi ein ungan mann til hús. Eftir hetta var friður.

Klokkan fýra sunnumorgunin fekk løgreglan hendur á ein støkkknív. Drongurin, ið átti knívin, hevði ikki brúkt hann, men kom av sínum eintingum til løgregluna og segði, at hann varð provokeraður í heilum. Um tað helt fram, fór hann at nýta knívin. Løgreglan tók sjálvandi knívin frá dreinginum beinanvegin, tí tað er ikki loyvi at hava støkknívar uppi á sær í Føroyum.

**- horsdal**



## Ófriður í Havn

Klokkan fýra leygarnáttina var bardagi uttan fyri Manhattan í miðbýnum í Havn. Bardagin var ógvusligur – so ógvusligur, at ein maður at enda noyddist at fara á sjúkrahúsið við sjúkrabili, tí hann var illa sligin og sparkaður. Maðurin varð innlagdur til eftirlit.

Klokkan hálvgum seks leygarnáttina varð løgreglan í Havn aftur boðsend, tí nakrir ungdómar spældu ov harðan tónleik. Grannarnir fingu ikki svovið og góvu sína misnøgd til kennar. Løgreglan kom á staðið, og eftir eina løtu var friður í grannalagnum.

**- horsdal**

## Bilur stolin

Leygardagin stjól ein drongur í Kollafirði ein bil frá einum vinmanni. Nakrir vinmenn stóðu og prátaðu, men brádliga fór eini drongurin avstað við bilinum hjá vinmanninum. Bileigarin ringdi alt fyri eitt eftir løgregluni. Men drongurin, ið fór avstað við bilinum, koyrdi eitt fitt strekki, steðgaði síðan og flýddi niðan í hagan. Løgreglan fekk ikki fatur á honum, men hann verður tó skuldsettur fyri stuldur.

**- horsdal**

## Fleiri koyra rúsdrekkakoyring

Hetta vikuskiftið hava fleiri koyrt motorakfar ávirkaði av rúsdrekka. Eitt nú varð ein maður tilvildarliga steðgaður leygarkvøldið av løgregluni, ið skjótt staðfesti, at maðurin var ávirkaður av rúsdrekka. Somuleiðis varð ein maður tikin at koyra við kenning sunnumorgunin í Kollafirði.

Leygarmorgunin var eitt ferðsluóhapp við Kaggan í Havn. Ein maður, ið var ávirkaður av rúsdrekka, hevði koyrt á stabbarnar, ið standa á vegnum uttan fyri Kaggan. Bilurin fór illa, men førarin, ið slapp uttan mein, varð alt fyri eitt tikin fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka.

**- horsdal**

Lesið Sosialin -so eru tit við!

**STUTT SAGT**

### Vegur hálur av olju

Fríggjadagin á middegi lak olja úr einum bili á vegnum millum Sandavág og Leynatunnilin. Tað var sera hált at koyra – so hált, at løgreglan ávaraði bilførarar um at koyra varliga eftir vegnum. Landsverkfrøðingurin fór beinanvegin at reinsa vegin, og seinnapartin var aftur trygt at koyra á vegnum. Vakthavandi á løgreglustøðini í Havn sigur, at tíbetur kom eingin til skaða.

**- horsdal**

### Innbrot í hjalli

Fríggjadagin varð løgreglan í Havn fráboðað, tí innbrot hevði verið í einum hjalli í Havn. Tjóvarnir vóru óbodnir farnir inn í hjallin og tóku tveir bøgir og eina rúgvu av brennivínsfløskum við sær. Gerningsmenninir eru ikki funnir, og enn hevur løgreglan ikki ferilin av, hvørjir teir eru.

**- horsdal**

### Burturblivin børn

Klokkan trý fríggjadagin vóru tvey børn horvin frá barnaheiminum í Havn. Børnini vórðu eftirlýst í Útvarpinum, og bert átta minuttir seinni vórðu tey funnin. 10 ára gamli drongurin og 6 ára gamla gentan høvdu tað gott.

**- horsdal**

### Ferðsluóhapp í Suðuroy

Seinnapartin fríggjadagin koyrdi ein motorsúkkla inn í ein bil í Øravík. Boð vóru í stundini send eftir sjúkrabilinum, tí maðurin á motorsúkkluni var illa fyri. Hann var koyrdur á sjúkrahúsið og innlagdur til eftirlit.

**- horsdal**